## Stanley á ferð við trio

Stanley Samuelsen og gittar- og sangtrio hansara Acoustica fer um mánaðarskiftið komandi á konserferð, ið byrjar í Føroyar. Fyrsta konsertin er fríggjakvøldið 28. september í Atlantis, dagarnar eftir eru Ribarhús og Norðurlandahúsið á skránni. Áðrenn konsertir verða spældar í Roskilde, Tisvilde, Hillerød, í Føroya Húsinum í Keypmannahavn í Warzawa, og á einum festivali Litava.



# Suðuroyingar missa Smyril í fleiri vikur




*Hendan ferjan, St. Ola, úr Estlandi skal røkja suðuroyarsiglingina í einar fimm, seks vikur í oktobur og november, tá ið Smyril er í dokk. Hon er sum gamli Smyril og tí verður vent aftur til gomlu ferðaætlanina, ta tíðina, hon er her og sostatt missa suðuroyingar eisini nakrar túrar hesa tíðina*

**Um mánaðarskiftið skal Smyril í dokk og hann verður úr sigling í einar fimm ella seks vikur**

SUÐUROYARSIGLING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verða suðuroyingar og øll tey, sum skulu ferðast ímillum Suðuroy og Havnina, noydd at vinka farvæl við Smyril.

Og tað verður í fleiri vikur, at ferðafólk noyðast at lata sær lynda, at ongin Smyril verður.

Orsøkin er tann, at nú skal flaggskipið hjá Strandferðsluni í dokk og har fer hann at standa upp á turrum í fleiri vikur.

Tað verður akkurát um mánaðarskiftið september-oktobur, ella um góðar tríggjar vikur, at Smyril skal í dokk.

Strandferðslan hevur gjørt avtalu við eina skipasmiðju í Landskrona í Svøríki um at taka Smyril í dokk.

- Fyribils hava vit sagt, at tað fer at taka tríggjar vikur at gera tað, sum er at gera við Smyril, sigur Regin Vágadal, stjóri á Strandferðsluni.

Men hann leggur afturat, at av royndum veit hann, at tað fer at taka nógv longri og sjálvur metir hann, at tað heldur fer at taka eina fimm, kanska seks vikur, áðrenn Smyril verður liðugur.

Sostatt skulu vit ikki vænta at síggja Smyril aftur ímillum oyggjarnar fyrrenn um hálvan novembur.

Nú Smyril skal í dokk, eru tað ymsar ábøtur, sum skulu gerast, umframt tað kravda botnsýni og annað eftirlit, sum Skipasýnið krevur.

Eitt nú skal eisini tey brekini gera, sum koma undir garantiskylduna hjá Skipasmiðjuni, sum bygdi skipið og sum skipasmiðjan sostatt skal hefta fyri.

- Í øllum førum kann eg siga, at klára sviar at gera smyril lidnan upp á fýra vikur, høvdu vit verið serstakliga væl nøgd, sigur Regin Vágadal. Men so skal hann siglast heim og gerast siglingarklárur aftur, so væntast kann, at hann verður burtur í seks vikur.

### Avloysarin klárur

Ímeðan Smyril er í dokk, verður tað estlendska ferjan, St. Ola, sum skal røkja Suðuroyarsiglingina.

Hann er áleið sama slag sum gamli Smyril og hevur stabilisatorar. Hann hevur verið í Føroyum fyrr og avloyst Smyril, so ferðafólkið kennir hann og hann hevur roynst væl.

Hann siglur tó nakað seinni enn gamli Smyril gjørdi og tí verður vent aftur til gomlu ferðaætlanina hjá Smyrli ta tíðina St. Ola er her.

Avtalan við estlendska reiðaran er, at St. Ola kann heintast tann 25. september og ætlanin er at taka hann heim beinanvegin, sigur Regin Vágadal.

Tað tekur einar tríggjar dagar at sigla hana heim og tveir dagar at gera hann siglingarkláran, so tað verður um mánaðarskiftið, at Smyril ferð.

### Vilja finna orsøkina

Eitt tað mest álvarsliga brekið, sum skal umvælast, eru stabilisatorararnir, sum fóru í vár, men sum tað eydnaðist at umvæla fyribils, so at teir skuldi halda, til Smyril fer í dokk.

- Serfrøðingar frá verksmiðjuni eru til reiðar á svensku skipasmiðjuni, tá ið Smyril kemur í dokkina og tá er ætlanin at kanna stabilisatorararnir gjølliga.

- Ætlanin er tá at umvæla teir, so at teir halda. Men ber tað yvirhøvur til, er eisini ætlanin at finna orsøkina til, at teir fóru og tað eru hesi viðurskifti, sum serføðingarnir eisini skulu kanna, sigur Regin Vágadal.

Smyril skal aftur í dokk um tvey til hálvttriðja ár.

Les eisini greinina: Fær 2,6 milliónir í endurgjaldi fyri Smyril.

## Fær 2,6 milliónir í endurgjaldi fyri Smyril

**Skipasmiðjan, sum bygdi Smyril, hevur nú goldið Strandferðsluni endurgjald fyri tey arbeiði, sum ikki eru nóg væl úr hondum greidd**

SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Skipasmiðjan, sum bygdi Smyril, hevur nú viðurkent, at ymsir partar av arbeiðnum eru ikki nóg væl úr hondum greiddur.

Núr Smyril skal í dokk um mánaðarskiftið september-oktobur var ætlanin, at øll tey brekini skuldu umvælast, sum koma undir garantiskylduna hjá skipasmiðjuni og sum Skipasmiðjan sostatt skuldi gjalda fyri.

Regin Vágadal sigur, at Strandferðslan hevur ein langan lista yvir ymisk viðurskifti umborð á Smyrli, sum Skipasmiðjan, ið bygdi skipið, ikki hevur greitt nóg væl úr hondum og sum hon sostatt skuldi hefta fyri, tí skipið er so nýtt.

Men Strandferðslan og skipasmiðjan í Spania eru komin á samt um, at ístðain fyri at Skipasmiðjan skal gjalda fyri ábøturnar, skal Strandferðslan heldur fáa eitt endurgjald fyri tey brek, sum eru.

Afturfyri sleppur skipasmiðjan so undan garantiskylduni og sostatt er hon nú leys av Smyrli.

Regin Vágadal sigur, at endurgjaldið er 350.000 evrur ella tilsamans 2,6 milliónir krónur, sum Strandferðslan fær í endurgjaldið frá Skipasmiðjuni fyri tey viðurskifti á Smyrli, sum ikki eru nóg væl úr hondum greidd.

Afturfyri er skipasmiðjan nú leys av sínum garantiskyldum og aftur fyri skal Strandferðslan átaka sær at gjalda fyri tær neyðugu umvælingarnar.

Hann sigur, at talan er um eini 100 punkt, sum Strandferðslan hevði kravt, skuldi koma undir garantiskylduna hjá Skipasmiðjuni, men sum hon nú hevur fingið endurgjald ístaðin fyri.

Men hann sigur, at talan er ikki um álvarslig brek. Eitt brek, sum er sjónligt, er, at tað lekur um onkrar rútar og at onkrir rútar eru brotnaðir.

Men so eru eisini onnur brek, sum eru minni sjónlig og hurðar skulu skiftast og annað.

Les eisini greinina: Suðuroyingar missa Smyril í fleiri vikur.



*Strandferðslan hevur nú fingið endurgjald fyri tey brekini, sum eru umborð á Smyrli og sostatt er skipasmiðjan í Spanina nú leys av skipinum*